

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 01 - 2012

# Klárt at seta á kreppugoymslurnar

Fleiri lond í Vesturheiminum hava longu fyrireikað ætlanir um at seta á sinar kreppugloymslur, um tað skuldi hent, at Iran ger álvara av hóttanini um at steðga oljuflutninginum ígjøgnum Hormuz-sundið. Sambært keldum í oljuvinnuni og diplomatum hava týðandi embætismenn í Altjóða Orkustovninum, IEA, tosað um spurningin í vikuni. Sum skilst er ætlanin, at eitt nú USA, Japan og lond í Evropa skulu taka 14 milliónir tunnur av olju um dagin úr sínum almennu goymslum. Hetta er olja, sum tað almenna í teimum einstøku londunum hevur í kreppugoymslum. Sum skilst klára kreppugoymslurnar eina tílíka skipan í ein mánað, og ætlanin er so, at hendan oljan skal koma ístaðin fyri tær umleið 16 milliónir tunnurnar, sum fara ígjøgnum Hormuz-sundið um dagin. Iran hevur hótt við at steingja sundið, um Vesturheimurin setir fleiri tiltøk í verk ímóti landinum. USA hevur svarað, at landið fer ikki at góðtaka eitt tílíkt iranskt stig. Amerikanararnir hava júst kunngjørt, at teir hava meiri olju á goymslu, enn mett var. Sambært teimum seinastu upplýsingunum hevði USA 329,7 milliónir tunnur av olju á goymslu á nýggjárinum.